# Luciakonsert í Norðurlandahúsinum

UMMÆLI
*Victor Carlsen*

Nú jólini eru í hondum er heilt vanligt at farið verður til nærum allar tær jólakonsertir, ið verða hildnar kring landið. Eitt av afturvendandi tiltøkunum, er konsertin hjá musikkskúlaundirvísingini í Havnini, t.v.s. bæði hjá Musikkskúlanum sjálvum og so kvøldskúlaskipanini. Mangir eru teir næmingar, ið nema sær kunnleika, antin á ljóðføri, ella við at læra seg at syngja, bæði sum einstaklingar og saman í kóri.

Norðurlandahúsið var fullsett hetta hóskvøldið, og ein sonn fragd var tað at síggja og hoyra børn saman við lærarum sínum framføra jólaleik og –sang. Tá jólaboðskapurin, eins og hann er at finna í Bíbliu okkara er grundarlagið undir slíkari framførslu, so er tað at efgnast um, at ikki bert vættrar og huldufólk vera ímyndin av jólunum, men eisini Jesusbarnið, Jósef og Maria, hirðrarnir og vísmenninir sleppa uppí part, og beinleiðis siterað verður úr skriftini á einn lættskiljandi hátt. Tá kennist tað, sum at jólini eru komin fyri hvønn einkultan, ið inni er.

Børn eru ymisk av lyndi og uppliva vist jólini á teirra serstaka hátt. Byrjað varð við sanginum um nissumammu, nissupápa og børn, ið gera alt so hugnaligt til jóla, og dansað verður um jólatræið. Hetta fingu vit ein forsmakk uppá, og so varð hildið áfram við jólasyrpu, ið guitarar leiktu sera hegnisliga. Eyðkent fyri guitarspælið er, at nøkur leika akkordirnar og so onnur leika melodiin. Hetta ger spælið gott og lívgangdi. Blásiljóðføri, so sum klarinettir, saxofonir og tvørfloytur lótu eisini hoyra frá sær, bæði sum felagsorkestur og sum trioir og kvartettir, og stuttligt var at hoyra, hvussu framúr væl børnini duga at spæla hesi ljóðføri.

Eftir eina góða og hugnaliga framførslu sluppu vit at hoyra eldra partin av næmingunum, t.v.s. tey, ið kalla seg fyri ”Ung stjørnuskot” framføra ein part av teirra jólaskrá. Her var talan um eitt meiri víðkað orkestur, har trummur og aðrar rytmur, keyboard, el-guitari, bassur og bláiljóðføri høvdu grundina undir einum størri felagskóri, ið sang framúr væl. ”Mariusonur”, ”Now it is Christmas” og onnur jólaløg orðu framførd.

Sum flestu tiltøkum líkt, so varð endað við vælkenda jólasanginum yvir allar, neniliga ”Gleðilig Jól”, ið setti eitt virðuligt punktum fyri hesum hugnaliga jólakvøldi uppi í Norðurlandahúsinum. Forldur, vinir og kenningar at hesum børnum, ið framførdu, kundu fara heim við kensluni um, at jólini eru fyri okkum øll, hvussu vit so enn uppliva tey. Latið okkum taka saman hendur, og ynskja hvørjum øðrum hetta. Tøkk til lærarar og skúlar fyri hollu undirvísing tykkara, og vit gleða okkum til at hoyra meiri frá tykkum eina aðru ferð.













Løgreglan áleggur bónda:

# Gev seyðinum at eta

**Ein bóndi í Leynum er meldaður fyri misrøkt av garðinum. Seyðurin er so rak og illa fyri, at løgreglan hevur álagt honum at geva kríatúrunum eitt sindur at eta**

DJÓRAHALD
*Stefan í Skorini*

Jarðarráð Føroya hevur meldað ein bónda í Leynum til løgregluna fyri misrøkt av djórunum á garðinum. Hetta er gjørt eftir at hava fingið fleiri áheitanir frá ónevndum fólki um, at djórini á garðinum ikki fáa ta røkt, ið tey hava fyri neyðini.

Løgreglan var á garðinum týsdagin og kannaði viðurskiftini saman við einum djóralækna. Myndir vórðu tiknar av djórum og av øðrum á garðinum. Djóralæknin skal síðani geva løgregluni eina skrivliga meting av støðuni.

## Ikki skuldsettur

Út frá hesi meting og vitjanini á garðinum skal løgreglan taka støðu til, um bóndin skal skuldsetast, ella um hann sleppur snikkaleysur. Enn er hann ikki skuldsettur, men málið er á lívi, sum vakthavandi á løgreglustøðini sigur. Málið verður sent sýslumanninum í Vestmanna, og hann skal taka støðuna, tí hetta er hansara øki.

Um talan er um djórapínslu, so liggur málið hjá løgregluni, og hon kann skuldseta bóndan, men um talan er um vanrøkt, kann løgreglan áleggja bóndanum at fáa viðurskiftini í rættlag, áðrenn langt um líður.

Staðfestast kann í øllum førum, at seyðurin ikki hevur fingið nóg mikið til matna, tí hann er ógvuliga rak og illa fyri. Tí fekk bóndin greið boð frá løgregluni um at geva seyðinum mat í munnin. Annað varð ikki álagt bóndanum á hesum sinni. Tað eigur tó at vera eitt av áhugamálum bóndans at hava góðan og feitan seyð.



*Ein bóndi í Leynum hevur fingið boð frá løgregluni um at geva seyðinum mat*

# Nýtt uppskot um ferðaætlan hjá Teistanum



*Páll á Reynatúgvu og Sólvit Simonsen skjóta upp, at Teistin siglir úr Skopun út í Hest fyrsta túrin á morgni. Síðani skal skipið fara aftur til Skopunar eftir sandoyingum og síðani beinleiðis á Gomlurætt*

**Tingmaðurin úr Sandoynni, Páll á Reynatúgvu, tekur undir við uppskotinum um, at Teistin skal fara fyrsta túrin á morgni úr Skopun út í Hest, men hann skal fara aftur til Skopunar og síðani beinleiðis á Gomlurætt. Hetta hevði spart sandoyingum tíð um morgunin**

TEISTIN
*Stefan í Skorini*

Páll á Reynatúgvu er tilreiðar at boyggja seg í sínum kravi um, at Teistin bara skal sigla millum Skopun og Gomlurætt. Hann tekur undir við Sólvit Simonsen av Sandi, ið skýtur upp, at Teistin fer út í Hest fyrsta túrin á morgni, so aftur til Skopunar og síðani beinleiðis á Gomlurætt.

Páll á Reynatúgvu hevur annars gjørt rættiliga nógv um seg í seinastuni, tá hann kravdi av Bjarna Djurholm, landsstýrismanni við samferðslumálum, at Teistin ikki skuldi sigla út í Hest fyrsta túrin á morgni men beinleiðis á Gomlurætt.

Orsøkin er, at tað tekur ov langa tíð hjá sandoyingum at koma yvirum til Gomlurætt, og tað er órímiligt.

## Spara 40 minuttir

Uppskotið hjá Sólvit Simonsen er, at Teistin siglir klokkan 6.15 úr Skopun til Hest og aftur, og síðani úr Skopun til Gomlurætt klokkan 7.05. Páll skýtur upp, at henda tíðarætlan verður togd tíggju minuttir, so at Teistin fer út í Hest klokkan 6.25, so skipið fer úr Hesti klokkan 6.40.

Eftir núverandi ferðaætlan mugu sandoyingar úr Skopun klokkan 6.35, og teir eru ikki á Gomlurætt fyrr enn 50 minuttir seinni, t.v.s. klokkan 7.25.

Páll á Reynatúgvu heldur, at hetta er órímiligt, tí at teir sandoyingar, ið arbeiða og ganga í skúla í Havn, mugu so tíðliga upp. Eftir hansara uppskoti, ið Sólvit Simonsen upprunaliga hevur borið fram, sleppa sandoyingar at sova 40 minuttir longri um morgunin.

Teistin hevði síðani skulað lagt at í Hesti fyrst, tá hann siglir aftur í Sandoynna seinnapartin. Soleiðis høvdu fólk úr Hesti mist tíð um morgunin, meðan sandoyingar høvdu mist tíð á seinnapartin.

Hetta uppskotið hevur tó við sær, at tað tekur ein tíma hjá hestfólki at sleppa úr Hesti til Gomlurætt.


**Seinasta freist at lata lýsingar inn til leygardagsblaðið 22/12 er hósdagin 20. desember kl.15.00**
**Freistin at bílegga litlýsingar ella lýsingar, sum ekstra-arbeiði stendst av, er kl. 14.00**
Sosialurin